## U-19 tapti fyrsta dystin

Føroyska U-19 landsliðið í fótbólti er í hesum døgum við í EM-undankapping í Bulgaria. Liðini í bólkinum eru Bulgaria, Turkaland, Danmark og Føroyar, og í gjár spældi føroyska liðið fyrsta dystin. Hesin var ímóti Turkalandi, og tíðliga í dystinum megnaði Rógvi Holm úr AB at leggja Føroyar á odda, tá hann var hægstur eftir hornaspark. Turkaland kom tó skjótt av við skelkin, tí fyri steðgin høvdu teir skorað tvær ferðir, so hálvleiksstøðan var 2-1. Turkaland fekk enn eitt mál eftir steðgin, so Føroyar mátti taka til takkar við einum 3-1 tapi í fyrsta dystinum.



## Ben Arfa í staðin fyri Saha

Í gjár kom fram, at Louis Saha kortini ikki kemur við franska landsliðnum til Føroya. Louis Saha hevur fingið ein knæskaða at dragast við, og hetta hevur givið pláss til ein nýggjan mann í hópinum. Franski landsliðsvenjarin kunngjørdi í dag, at valið er fallið á Hatem Ben Arfa. Bert 20 ára gamli Ben Arfa spælir til dagliga við fronsku meistarunum úr Lyon, og verður mettur at vera ein kvikur vongleikari. Ben Arfa, sum áður hevur verið í sambandi við Manchester United, hevur við nógvum málum á yngru fronsku landsliðunum víst, at hann er ein málfarligur harri.

# Føroyar beinleiðis á Eurosport

**Tað verða ikki bert føroyingar og fraklendingar, sum sleppa at síggja landsdystin í millum Føroyar og Frakland. Dysturin verður nevniliga vístur beinleiðis á kendu ítróttarrásini, Eurosport**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Leygardagin vera ikki færri enn 21 EM-undankappingardystir á skránni runt í Evropa, og fleiri av hesum dystunum eru ógvuliga týdningarmiklir fyri fleiri av londunum.

Í EM-undankappingarbólki B, har Føroyar er eitt av liðunum, verða tríggir dystir á skránni. Hetta er ein rættiliga spennandi bólkur, tí undan síðstu dystunum eru tað heili fýra av liðunum í oddinum, sum hava ein møguleika at koma víðari.

Hjá varaheimsmeistarunum úr Fraklandi sær ikki so gott út. Teir liggja í løtuni á einum triðja plássi aftan fyri Skottland og Italia, og tí skulu teir helst vinna síðstu tríggjar dystirnar, um teir skulu koma víðari til EM-endaspæli.



*Stóra ítróttarrásin, Eurosport, fer at vísa landsdystin á Tórsvølli leygardagin, tá føroysku spælararnir skulu møta stórum stjørnum sum Henry, Vieira, Thuram og Malouda*

Fyrsti av hesum trimum dystunum verður á Tórsvølli leygardagin, har teir koma á vitjan hjá Føroyum. Hetta er ein dystur, sum franskmenn skulu vinna, um teir skulu gera sær vónir um at koma víðari til EM-endaspælið.

### Føroyingar vístir um alt Evropa

Í Føroyum verður bíðað í spenningi til dystin ímóti varaheimsmeistarunum. Tórsvøllur verður helst fultsettur til dystin, meðan nógvir føroyingar helst fara at sita framman fyri sjónvarpskíggjan og hyggja leygardagin.

Men tað verða tó ikki bert føroyingar og fraklendingar, sum fáa møguleika at hyggja eftir dystinum. Stóra ítróttarrásin, Eurosport, hevur nevniliga eisini valt at vísa dystin millum Føroyar og Frakland beinleiðis. Tí kunnu fólk kring alt Evropa fylgja við Súna Olsen, Christian Høgna Jacobsen, Jákup Mikkelsen og hinum føroysku spælarunum, tá teir fara á vøllin ímóti stórum stjørnum sum Henry, Vieira, Malouda, Thuram o.ø.

## Klaksvíkar Talvfelag skipar fyri vikuskiftiskapping

Fríggjadagin tann 13. oktober kl. 19.00 byrjar vikuskiftiskappingin Kjølbro Open 2007.

Kappingin er partur av Grand Prix- kapping, sum TSF fyriskipar saman við feløgunum. Gjøgnum veturin verða kappingar fyriskipaðar kring landið, og teir, ið samanlagt standa seg best í kappingunum, koma í finaluna. Fyri at koma í finalubólkin krevst, at luttikið verður í minst 5 av 8 kappingum. Í Grand Prix – kappingini eru eisini tvær bólkakappingar, hartelvarar við lægri styrkitali kappast sínamillum.

Kjølbro Open 2007 er tann næsta kappingin í røðini. Seinasta vikuskiftið vunnu Ólavur Simonsen og Finnbjørn Vang, báðir úr Klaksvíkar Talvfelag, fyrstu kappingina.

Bólkakappingarnar vunnu ávíkavist Herborg Hansen og Einar Gregersen, bæði úr Klaksvíkar Talvfelag.

Kjølbro Open 2007 er almenn og fer fram í hølum felagsins. Telvað verður soleiðis:

**1. umfar:**
fríggjakvøldið kl. 19.00
2. umfar: leygardagin kl. 10.00
3. umfar: leygardagin kl. 14.00
4. umfar: leygardagin kl. 18.00
5. umfar: sunnudagin kl. 13.30

Umhugsunartíðin er 1½ tíma til alt talvið. Tilmelding fer fram á: ktf@post.olivant.fo, og seinasta freist er hóskvøldið 12. Oktober kl. 21.00.

# Tryggingarfelagið Føroyar stuðlar neistakvinnum

**Besta kvinnuliðið hjá Neistanum hevur nú skrivað undir samstarvsavtalu við Tryggingarfelagið Føroyar**

HONDBÓLTUR
*Tíðindaskriv*

Tryggingarfelagið Føroyar verður høvuðsstuðul hjá besta kvinnuliðnum hjá Neistanum, ið seinastu árini hevur verið millum fremstu hondbóltsliðini í landinum.

- Neistin ger eitt megnar arbeiði til frama fyri føroyskan ítrótt, og harvið fyri trivna, heilsu og vælferð hjá føroyingum, og hetta er nakað, ið Tryggingarfelagið Føroyar fegið vil vera við til at stuðla. Vit eru tí sera fegin um at gerast høvuðsstuðul hjá besta kvinnuliðnum hjá Neistanum, sigur Kristina Háfoss, deildarstjóri hjá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Neistin fegnast eisini um nýggju avtaluna við Tryggingarfelagið Føroyar, ið fer at geva kvinnuliðnum neyðuga fíggjarliga grundarlagið til at fáa so góðar umstøður sum gjørligt í hesum kappingarárinum, ið stendur fyri framman.

- Fyri at náa so góðum ítróttarligum úrsliti sum gjørligt, er neyðugt at hava eitt gott fíggjarligt grundarlag. Hetta tryggjar avtalan við Tryggingarfelagið Føroyar okkum, og vit eru sera fegin um hetta, sigur Kjartan Thomassen, formaður í Neistanum.

- Tryggingarfelagið Føroyar er stórur stuðul hjá føroyskum ítrótti og føroyskari mentan, og avtalan við Neistan er ein partur av heildarætlanini hjá felagnum, sigur Kristina Háfoss, deildarstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar.



*Neistin og Tryggingarfelagið Føroyar hava skrivað undir avtalu, sum ger, at Tryggingarfelagið Føroyar verður høvuðsstuðul hjá besta kvinnuliðnum hjá Neistanum*